DAGSINS MEINING

Total kapitulatión

Tí›indafundurin í Tinganesi í gjár var milt sagt ein »ynkelig affera«. Sjáldan hava føroyingar sæ› landsins lei›andi fólk so groggy og ódisiplinera› fyri opnum skíggja sum henda søguliga hósdagin 2. november. Hetta var antiklimaks á tí uppgeila›a politiska leiki, i› fyrst og fremst Tjó›veldisflokkurin hevur sta›i› á odda fyri nú í skjótt tr‡ ár.

Ein slík kúvending í einum so stórum máli kemur neyvan av ongum. Ta› er ikki so ringt heldur at ímynda sær, hvat er fari› fram handan leiktjøldini í Tinganesi hesar seinastu dagarnar. Anfinn er vor›in so hart kroystur av sínum egna baklandi, at hann hevur givi› Tjó›veldisflokkinum vali› millum at fara úr Tinganesi ella at fylgja stig fyri stig leisti Fólkafloksins. Fyri ikki heilt at missa andlit hevur forma›ur Tjó›veldisfloksins tó fingi› løgmann at var›veita or›i› fullveldi og eina diffusa fólkaatkvø›u um eina ella a›ra ætlan. Ta› sær tí ikki mætari út enn, at løgma›ur loksins hevur avdúka› ta›, sum hann hevur dult so leingi og kamuflera› aftan fyri heiti› "Brei› semja".

Ta› stendur púra greitt, at landsst‡ri› hevur hálsa› um. Tjó›veldisflokkurin hevur veri› ov brá›ur at framskunda eina annars náttúrliga gongd. Nú er fullveldi› ikki byrjanin á gongdini. Nú er ta› endin, naka›, i› líkist meira tí, sum eisini andstø›an hevur víst á: at vit skulu yvirtaka sohvørt vit megna ta› og gerast meira og meira sjálvstø›ug alt vi› tí fyri eyga ein dag at standa sum sjálvstø›ug tjó›. Javna›arflokkurin hevur so sum eitt alternativ eisini skoti› upp at gera eina heilt n‡ggja skipan vi› Danmark.

Var ta› hent í nøkrum ø›rum landi, ta›, sum Føroya fólk nú eru vitni til, hev›i landsst‡ri› lagt frá sær, og val var› útskriva›. Einhvør stjórn, sum hev›i li›i› eitt so stórt ni›urlag í sínum kardinalmáli, hev›i tiki› eitt val. Ta› er djúpt, djúpt ódemokratiskt at ver›a sitandi.

Kúvendingin - tann totala kapitulatióninneed vera ein beiskur biti hjá Tjó›veldinum at svølgja. Men kamelarnir ganga væl ni›ur. Tær n‡tist annars ikki at vera serfrø›ingur fyri at gjøgnumsko›a, hvat veruliga hendir: At Tjó›veldi› hevur valt maktina framum um fullveldi›. So einfalt er ta›. Tá forma›ur Tjó›veldisfloksins bi›ur politikarnar lata vera vi› at gera máli› til partapolitikk, so er ta› toppurin á øllum frekleika. Tí Tjó›veldisflokkurin hevur sjálvur gjørt hetta til partapolitikk. Tí, var ta› máli›, i› flokkurin helt fast um, so hev›i hann eisini tiki› seg úr landsst‡rinum eftir hetta stóra ni›urlagi›. Men ta› er maktina, i› flokkurin vil halda fast um, og ta› prógvar stø›an nú. Eitt sindur í andstø›u til or›ini hjá einum kendum tjó›veldismanni: vit víkja ikki ein tumma.

Veruleikin er, at ta› hevur ongantí› veri› rikin so feitur partapolitikkur um sun nú. Hetta er feitur partapolitikkur! Tjó›veldisflokkurin ger hetta fyri at tryggja sær valdi› eisini eftir næsta løgtingsval. Hetta sn‡r seg um einki minni enn løgtingsvali›.

Sosialurin

NØVN Í VIKUNI

Gullbrúdleyp

Í morgin, 5. november, kunnu hjúnini Nicolina og Joen Jacob Thomsen - Vestmanna Jóan Jakku - í Sandavági halda gullbrúdleyp.

Nicolina er ætta› úr Sandavági, dóttir Masu, sum var av Sondum, og Dánjal av Steig. Jóan Jakku er, sum navni› sigur, úr Vestmanna, hóast fa›irin var ætta›ur úr Sandavági. Foreldur hansara vóru Tummas Georg og Sigrid, i› var úr Mortansstovu í Havn. Tey vóru lærarafólk í Vestmanna.

Nicolina og Jóan Jakku eiga tvey børn. Sigrid, sum b‡r í Vestmanna, og Dánjal, sum b‡r í Sandavági.

Nicolina og Jóan Jakku eru kend av nógvum fólki. Altí› hevur gáttin í heimi teirra í Giljum veri› lág, og ta› eru ikki so fá, sum har hava siti› væl. Stutt er oman á Valloyruna, har allar ítróttarkappingarnar hava veri›, og lætt er at detta inn á gólvi›. Av tí sama er telefonin heldur ongantí› í fri›i, tá dystir eru á Valloyruni. Ta› er so ómakaleyst at ringja til Nicolinu at frætta ársliti›.

Jóan Jakku byrja›i sum so mangur føroyingur á sjónum. Hann sigldi krígsárini, men kom stutt eftir krígslok í Haraldsstovuhandilin í Sandavági, har hann var krambakalur og skrivstovuma›ur.

Har rann saman vi› sandavágsgentuni Nicolinu, og tey giftust í 1950. Nevnast kann, at fyri tveimum vikum sí›an hev›i Sandavágs Ítróttarfelag eina frams‡ning av gomlum klæ›um, millum anna› brú›arkjólum, á Giljanesi, har eisini 50 ára gamli brú›arkjólin hjá Nicolinu var› s‡ndur á palli.

Fyrst í sekstiárunum fór Jóan Jakku í starv í Føroya Banka og var deildarlei›ari í Vágum, til hann leg›i frá sær fyri aldur í 1989.

Nógv hevur veri› at tikist vi› í frítí›ini. Mest hevur ta› veri› jar›arbrúki›, sum ligi› hevur honum nær. Røkta›i á Slættanesi eina fjór›ingsøld og seinni á Oyrargjógv.

Nú hann er vor›in eldri, er jar›arbrúki› framvegis frammalaga í gerandisdegnum. Hann veltir, hoyggjar og fæst annars vi› sey› og ta›, sum har til hoyrir.

Jør›ina hevur hann fingi› frább‡tta, solei›is, at nú er einb‡ttur hagi, Rókin, mi›skei›is millum Oyrargjógv og Slættanes. Rókin ber 70 ásey›ir. Tó eru ta› nú mest næstu ættarli›ini, sum røkja hagan, nú Jóan Jakku nærkast kempuárunum.

Men ikki hevur alt bara veri› mold og ull kortini. Virkin ítróttarma›ur hevur hann veri›, og hondbóltsdómari í eitt mannaminni. Seinnu árini hevur hann veri› virkin limur í Lions Club í Vágum.

Nicolina hevur veri› ímyndin av føroysku húsmó›rini. Hildi› húsi› vi› øllum tí, har til hoyrir. Uppvaksin í bóndahúsi var henni jar›arhugurin hjá Jóan Jakku ikki fremmandur.

Og so alt hondarbei›i›, hon er kend fyri. Ta› er ikki so líti›, hon hevur lagt frá hondini av fínari hondarbei›i, umframt øllum teimum »vanligu« pløggunum, hon hevur virka› upp á børn og ommubørn.

Ta› eru ikki so fá fólk, sum hvørja ólavsøku ganga í føroyskum klæ›um, sum Nicolina hevur brodera›. So nógv er ta› vor›i› til vi› árunum, at ikki hevur hon tal á tí. Og framvegis broderar hon, hóast ta› nú mest er í dagsl‡si, nú eyguni eru vikna› eitt sindur.

Gullbrúdleypsdagurin ver›ur hildin saman vi› familjuni su›uri í Havn, har Nicolina hevur veri› nú nakrar dagar, eftir at hon var so óheppin at bróta beini› hefyri.

25 ár á telefonverkinum

Petur J. Johannesen í Havn kann nú um dagarnar hátí›arhalda 25 ára starvsdag hjá Føroya Tele - ella á Telefonverki Føroya Løgtings, sum stovnurin hevur iti› ta› mesta av farnu øldini.

Petur kom í læru á Radioodeildini ella Forsterkarastø›ini á Tinghúsvegnum sum elektronikmekanikari. Ta› var í teirri tí›ini, tá starvsfólki› kundi klára seg í einum bygningi millum stórar og klossutar sentralar. Sí›ani 1975 hevur menningin veri› ógvuslig. Frá bert at hava eina linju til oyggjarnar og bygdabor›, sum sí›ani avgreiddu telefonsamtalurinar, er sera gott samband vi› allar oyggjarnar, har ta› ikki er ney›ugt at bí›a eftir hvørjum ø›urm. Teir á Radiodeildini syrgja somulei›s fyri at FM, sjónvarp, NMT og ikki minst GSM kann n‡tast á stórt sæ› øllum plássum í Føroyum.

Seinastu 13 árini hevur Petur í sínum starvi hildi› til á Húsareyni, har Radiodeildin hevur sítt Mekka.

Umframt starvi› á Føroya Tele hevur Petur stóran áhuga fyri gomlum akførum, og er hann eina av krumptappunum í Føroya Ellisakførum.

Tøkk

Øllum tykkum, sum á ymiskan hátt vístu samkenslu, tá i› elska›i ma›ur, pápi og abbi okkara

ARNHOLD MARTIN HANSEN

doy›i og var› jar›a›ur.

Tøkk til Dávid Johannesen, prest, fyri troystarrík or› í kapellinum og í kirkjuni. Tøkk til sangarar og kirkjutænarar og til tykkum øll, sum á ymiskan hátt hjálptu til.

Ein serstøk tøkk til starvsfólki› á ellisheiminum í Vágum, sum vóru um hann til ta› sí›sta.

Familijunnar vegna
kona og børn

Sosialurin

Sosialurin
Stovna›ur: 1927
Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Bla›stjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tí›indalei›ari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Markna›ardeild: lysingar@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

Bla›fólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Ey›un Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turi› Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Sveinur Tróndarson sveinur@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmi›stø›in

Avgrei›sla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Bla›i› ver›ur prenta›
mánadag-friggjadag klokkan 14[00]

L‡singar

Freistir:	Tekstl‡singar	Størri l‡singar	L‡singartorgi›	Heilsanir
T‡sdagsbla›i›	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsbla›i›	T‡s. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsbla›i›	Mik. kl. 10	T‡s. kl. 15	T‡s. kl. 12	T‡s. kl. 12
Friggjadagsbla›i›	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsbla›i›	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri l‡singar, sum nógv arbei›i stendst av, mugu vera inni í gó›ari tí› og á›renn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbi›jast í gó›ari tí›.

Stødd:
Ein heil sí›a í Sosialinum er 254mm brei› og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmi› millum teigarnar er 4mm.

Sjómansskúlin fyri sjómansskúlanæmingar

Víddin í Føroya Sjómansskúla er nú nærum tvífalda›, eftir at útbygningurin er klárur at taka í n‡tslu. Í sambandi vi› hátí›arhaldi› seg› i Daniel Johan Poulsen, skúlastjóri, at sjómansskúlin skal vera fyri sjómansskúlanæming ar burturav

SJÓMANSSKÚLIN
Stefan í Skorini

Seinnapartin hósdagin var samkoma í n‡ggju hølunum hjá Føroya Sjómansskúla í sambandi vi›, at útbyggingin endiliga er li›ug og klár hjá næmingunum at taka í n‡tslu. Flestu tólini standa longu klár hjá næmingunum, og n‡ggi simulatorurin, sum A.P. Møller hevur lati›, er í kjallaranum í útbygninginum.

Skúlin hevur fingi› 1000 fermetrar meira at rá›a yvir. Samla›a víddin á skúlanum er nú 2400 fermetrar.

– Vit høvdu næstan mist vónina um, at naka› fór at ver›a gjørt, tí sí›an eg kom á skúlan í 1972, hevur ofta veri› tosa› um útbyggingar, men einki er hent, sigur Daniel Johan Poulsen.

Tórbjørn Jakobsen, landsst‡risma›ur handa›i Daniel Johan Poulsen lykilin til n‡ggju hølini á Sjómansskúlanum

Mynd: Jens Kr. Vang

Hann leg›i eisini dent á, skúlin hevur brúk fyri hvørjum fersentimetri, og hann endurtók ta› sí›ani.

Eisini leg›i hann áher›slu á, at Føroya Sjómansskúli skal vera fyri sjómansskúlanæmingar. Hetta var óiva› eitt skot eftir myndugleikunum, sum hava gjørt av, at næmingar av Fró›skaparsetrinum eisini skulu hava innivist á Sjómansskúlanum.

Sjómansskúlin var› bygdur í 1962, og sí›ani er eingin útbygging framd, hóast tí›irnar ikki eru tær somu. Onnur krøv ver›a í dag sett einum navigatøri, og tí er útbyggingin hart tiltrongd.

Bispur vil einki siga

Hvørki bispur ella prestar vilja gera vi ›merkingar til or›ini hjá Olofsson í bla›num í gjár

KIRKJUSTRÍ‹
Ey›un Klakstein

Hans Jacob Joensen, bispur, vil ongar vi›merkingar gera til or›ini hjá Peter O. K. Olofson í bla›num í gjár.

Olofson hevur gjørt stø›una upp, eftir at ein tí› er frálí›in sí›ani donsku bispavitjanina í Føroyum á hvítusunnu.

Olofson heldur, at fólkakirkjan ver›ur til eina sekt, sum villlei›ir fólk, tí hon lovar umbo›um fyri Sodoma og Gomorra inn í kirkjuna at prædika.

Hann heldur, at bispur og teir 15 prestarnir, sum tóku undir vi› at donsku bisparnir skuldu sleppa prædika í kirkjum í Føroyum, eru samsekir í villlei›ingini.

Bispur sigur seg einki hava at siga til hesi or›, og prestar, sum Sosialurin hevur veri› í sambandi vi›, vilja heldur ikki svara› Olofson.

Argar í n‡ggjari teknirø›

TEKNARI
Ey›un Klakstein

Hann dámar væl at arga fólk vi› sínum tekningum, og ta› ger hann meira enn nakrantí› í n‡ggjari teknirø›, sum ver›ur at fáa til keyps í dag.

Jógvan á Høvdanum (yngri) hevur seinastu tvey árini tekna totalt langt úti tekningar til ungdómsbla››i hjá Dimmalætting, men í dag gevur hann út eina teknirø› upp á 52 sí›ur, har hann leggur dent á, at tekningarnar eru enn longri úti enn á›ur.

– Eg vil gjarna sleppa út vi› teimum tekningunum, sum eg havi gjørt. Vónandi fær onkur gle›i av teimum, tí ta› er púra vist, at onkur ver›ur ó›ur um tær, sigur 21 ára gamli klaksvíkingurin.

Stílurin í n‡ggju teknirø›ini er tann sami, sum fólk frammanundan kenna Jógvan fyri. Hann hevur tekna› nógvar smáar søgur í n‡ggju rø›ini, sum kostar 50 krónur. Útgávan er gjørd saman vi› Svabo Creations í Klaksvík.

Í dag klokkan 14.00 ver›ur Jógvan á Høvdanum á Torginum í SMS, har hann fer at signera n‡ggju teknirø›ina.

Seinasta n‡ggja um skinnini

LANDBÚNA‹UR
Áki Bertholdsen

Nú í evstu løtu er ta› hent, at danska Matvørueftirlit› hevur bo›a› frá, at tiki› ver›ur ímóti sey›askinnum úr Føroyum aftur í ár, eftir somu treytum sum í fjør.

Sum ta› sæst á greinunum á sí›u 4 og 5, var ta› annars vandi fyri, at MBM kom at liggja innibrent vi› øllum skinnunum, tí avtala› var gjørd um at útflyta tey til Spania. Men eftir eini gamlari ES forskrift, ber ikki til at útflyta sey›askinn úr Føroyum til ES lond.